# Vágoyggin kann samstarva

**Borgarstjórin í Sandavágs kommunu, Rósa Samuelsen, sær ongan trupulleika í, at kommunurnar í Vágum fara at samstarva um barnaverndarøkið. Hon tekur tískil undir við Kommunusamskipan Føroya, ið metir, at barnaverndarøkið skal leggjast út á størri eindir, enn lógaruppskotið hjá Almannaráðnum mælir til**

NÝGGJ BARNAVERNDARLÓGGÁVA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Barnaverndarøkið er eitt stórt økið, og yvirtøkan má skipast rætt, tí annars er vandi fyri trupulleikarnar á økinum gerast enn størri, enn teir eru í dag, sigur Rósa Samuelsen.*
*Mynd: Savnsmynd*

Málið um nýggja barnaverndarlóggávu í Føroyum hevur leingi verið í umbúna. Fyrsta viðgerð av nýggju lógini hevur verið, og málið liggur nú í trivnaðarnevndini undir løgtinginum. Kommunurnar skulu eftir ætlan yvirtaka barnaverndina 1. januar 2004.

Núverandi uppskot leggur upp til, at hvør kommuna hevur sína egnu barnavernd, og í viðmerkingunum til lógaruppskotið eru tað fleiri stovnar, ið ikki taka undir við hesari ætlan hjá landsstýrismanninum. Kommunusamskipan Føroya heldur, at meginreglan við nærleika og burðardygd á barnaverndarøkinum verður best rokkin við, at barnaverndin verður býtt í níggju øki.

Læknafelagið setur eisini spurning við, hvørt tað er rætt, at smáu kommunurnar hava sína egnu barnavernd. Felagið metir, at tað verður lætt, at einstakir persónar fáa gegnistrupulleika á so smáum plássum.

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, sigur í viðmerkingunum til Kommunsamskipan Føroya, at hann hevur ikki heimild at býta barnaverndina í níggju øki, tá barnaverndin gerst eitt øki undir kommununum. Tá liggur avgerðin hjá landsstýrismanninum í kommunumálum.

### Samstarv

Borgarstjórin í Sandavágs kommunu, Rósa Samuelsen, tekur undir við, at kommunurnar yvirtaka barnaverndina. Hon vísir á, at tað er ómetaliga týdningarmikið, at yvirtøkan verður væl úr hondum greidd, tí økið er so eymt.

– Barnaverndarøkið er eitt stórt økið, og yvirtøkan má skipast rætt, tí annars er vandi fyri trupulleikarnar á økinum gerast enn størri, enn teir eru í dag, sigur Rósa Samuelsen.

Spurd, um hon tekur undir við, at barnaverndarøkið verður lagt út á størri eindir, svarar Rosa Samuelsen, at hon heldur ikki, at kommunurnar í Vágum høvdu havt nakran trupulleika við at samstarva. Hon leggur afturat, at kommunurnar hava ikki tosað saman enn um møguleikan , men eitt samstarv kundi avgjørt verið ein góð loysn.

Borgarstjórin í Sandavágs kommunu sigur, at um økini gerast ov smá, er vandi fyri, at fólk skjótt fáa ein gegnistrupulleika. Tað er ikki heppið um eitt nú ein heilsusystir, bæði er í barnaverdini og er heilsusystir hjá børnunum, heldur Rósa Samuelsen

Hon væntar ikki, at barnaverndarøkið verður verri røkt, nú tað verður lagt út á kommunurnar. Rosa greiðir frá, at barnaverndin í Sandavági hevur higartil verið effektiv, og hon væntar ikki fleiri trupulleikar, tá kommunan yvirtekur økið frá landinum við ársbyrjan komandi ár

### Kostnaðarmikið

Tað er einki dulsmál, at barnaverndarøkið verður eitt rættiliga kostnaðarmikið økið hjá kommununum. Fíggjarætlanin hjá Sandávágs kommunu var í 2003 mett at verða 1,4 mio krónur.

Spurd, um hvussu nógvur peningur skal nýtast til barnaverndina í Sandavágs kommunu komandi ár, svarar borgarstjórin, at upphæddin verður ikki undir 300.000 krónur. Hetta svarar til ein góðan fimting av allari fíggjarætlanini, so økið er tungt fíggjarliga.

Rosa Samuelsen sigur seg vænta, at kostnaður av barnaverndini verður fíggjaður við hægri skattaprosenti. Landsstýrismaðurin mælir til, at kommunurnar kring landið hækka skattaprosenti við 0,9%, meðan landið lækkar sítt skattaprosent samsvarandi.

Borgarstjórin í Sandavágs kommunu sigur, at væntandi fer kommunan at gera eftir boðunum hjá landsstýrismanninum.

# Vald og gjald fylgjast at

**Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Jan Christiansen, góðtekur ikki, at kommunurnar bert skulu gjalda fyri barnaverndina, men samstundis ikki sleppa ikki at valda. – Tað ber bara ikki til, at vit yvirtaka eitt økið, har vit ikki sjálvi sleppa at avgera, hvussu økið skal skipast, sigur Jan Christiansen**

NÝGG BARNAVERNDARLÓGGÁVA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Kommunurnar hava sett fram ynski um, at tær vilja yvirtaka øll økini, ið hava nakað við borgaran at gera, tað verið seg á barna- og eldraøkinum. Men kravið er so, at vit eisini sleppa at ráða á økinum, tí annars er eingin grund til at yvirtaka økið, sigur Jan Christiansen*
*Mynd: Jens K. Vang*

– Vald og gjald skulu fylgjast at, sigur ein avgjørdur Jan Christiansen, tá hann verður spurdur um, hvat hann heldur um, at ein Meginbarnavernd undir landsstýrismanninum skal hava eftirlit við barnaverndunum hjá kommununum kring landið.

Hann tekur undir við, at eitt eftirlit skal verða á økinum, men tað skal ikki verða undir landsstýrismanninum, tí so er vandi fyri, at landið fær ov stórt vald á økinum. Hann ber ótta fyri, at kommunurnar bert fara gjalda fyri barnaverndina, men at framvegis fer landið at stýra økinum, og tá er eingin grund til at yvirtaka økið.

Jan Christiansen vísir á, at stovnurin, ið skal hava eftirlit við barnaverndunum átti at verið skipaður sum ein interkommunalur stovnur, og ikki undir landsstýrismanninum, sum uppskotið um nýggja barnaverndarøkið mælir til.

– Kommunurnar hava sett fram ynski um, at tær vilja yvirtaka øll økini, ið hava nakað við borgaran at gera, tað verið seg á barna- og eldraøkinum. Men kravið er so, at vit eisini sleppa at ráða á økinum, tí annars er eingin grund til at yvirtaka økið, sigur Jan Christiansen

### Færri eindir

Jan Christiansen heldur tað vera lítið sannlíkt, at allar kommunurnar kring landið skulu hava sína egnu barnavernd.

– Barnaverndarøkið er rættiliga kostnaðarmikið, og verða fleiri tilburðir í eini kommunu, har barnaverndin má inn, er vandi fyri, at fíggjarliga støðan kommununum kollsiglir, og tað kann ikki verða ikki rætt. Vit í Kommunusamskipan Føroya mæla til, at økið verður býtt út í 9 eindir, so sleppast kann undan, at kommunur kring landið koma í óføri av barnaverndarøkinum, sigur borgarstjórin í Tórshavnar kommunu.

### Økjandi útreiðsla

Jan Christiansen sigur, at forsorgarøkið gerst dýrari og dýrári fyri hvørt ár.

– Vit hava ein mistanka um, at landið hevur sæð, at forsorgarøkið er ein tikkndi bumba, og tí skulu vit yvirtaka økið. Forsorgarøkið er vaksið nógv seinastu árini, og einki bendir á, at útreiðslurnar fara stagnera í framtíðini. Vit vilja gjarna yvirtaka barnaverndina, men skulu vit eisini ráða yvir, hvussu vit ynskja at skipa okkum á økinum, greiðir borgarstjórin frá.

Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu væntar, at kostnaður á forsorgarøkinum fer komandi árini at verða tað dupulta av, hvat økið kostar í dag. Hann heldur tí tað verða í tøkum tíma, at avvarandi myndugleikar fara at umhugsa eina nýggja skipan á økinum.



# Eingin forðing fyri tinglýsing

**Tað er eingin tøknilig forðing fyri, at Tinglýsingin kann fáast í eina serføroyska edv-skrá, sigur Niels Christian Nolsøe, stjóri í Elektron. Hann kennir sína fyritøku vera fyri vanbýti, nú Gjaldskipanin verður steðgað, og tinglýsingin liggur í danskari edv-skrá**

UPPLÝSINGAR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*Elektron bjóðar seg gjarna fram at gera tøkniliga arbeiðið at fáa tinglýsingina í eina serføroyska edv-skrá, sigur Niels Christian Nolsøe, stjóri í Elektron, sum heldur landsstýrismannin gera mismun*

Tað er av tøkniligum orsøkum, at føroyska tinglýsingin liggur í í danskari edv-skrá.

Tað var ein av umberingunum í Sosialinum hósdagin hjá Høgna Hoydal, landsstýrismanni við lógarmálum, fyri, at tinglýsingin ikki verður umsitin sambært lógini. Hesum uppáhaldi vísir Niels Christian Nolsøe, stjóri á Elektron, aftur.

– Tað er heilt vist ikki nøkur tøknilig forðing fyri, at Tinglýsingin kemur í eina føroyska edv-skrá. Løgmálaráðið skal bara taka seg saman, um teir veruliga vilja hava tinglýsingina á føroyskar hendur, sigur Niels Christian Nolsøe, stjóri í Elektron.

### Ímóti lógini

Tað, at telduskrásetta tinglýsingin liggur hjá CSC-Danmark, merkir, at Tinglýsingin ikki virkar sambært teirri lógini, sum løgtingið samtykti í 2000.

Í lógini verður sagt, at allar upplýsingar í edv-skránni hjá tinglýsingini skulu vera atkomiligar hjá øllum á internetinum. Í donsku skipanini krevst, at rindað verður fyri íbinding, eitt fast mánaðargjald og eitt ávíst krónutal fyri hvønn brúktan tíma.

Tað hevði lættliga borið til at sloppið undan hesum við at gjørt eina føroyska skipan, sigur stjórin í Elektron, sum landsstýrið sjálvt eigur í.

– Løgmálaráðið skal gera sum øll onnur. Tey skulu orða, hvat tey vilja hava. Til dømis um hon skal byggja á eina almenna atgongd umvegis internetið. Løgmálaráðið skal gera upp, hvat tey vilja hava og gera útboðstilfar. Tað eru fleiri føroyskar fyritøkur, sum megna at gera arbeiðið, og eg kann siga fyri okkum, at vit eru áhugað, sigur Niels Christian Nolsøe.

### Fyri vanbýti

Tað kann tykjast løgið, at sami landsstýrismaður, sum við lóg og valdi hevur forðað Gjaldskipanini hjá Elektron og peningastovnunum at virka í samstarvi við PBS í Danmark, sjálvur hevur sent alla tinglýsingina til Danmarkar í eina danska edv-skrá.

Stjórin á Elektron dylur ikki, at hann heldur mismun vera gjørdan.

– Hetta er bara ein av mongum mótsetningum, sum eru í hesum málinum. Tað er heilt vist, at upplýsingar um ognarviðurskifti eru meira viðkvæmar enn upplýsingar um, hvat tú rindaði SEV síðsta mánaði.

Tað er eisini løgið, at gjaldkortini eru undantikin forboðnum, tí tær upplýsingarnar eru nógv meiri viðkvæmar. Men hetta prógvar bara, at talan er um eitt vinnuforboð, sum einki hevur við trygd hins einstaka at gera, sigur Niels Christian Nolsøe.

Hann veit ikki, hvat Elektron fer at gera, um rættarmálið avger, at tað var í samsvari við lógina, at Gjalskipanin varð steðgað. Hann vísir aftur, at Elektron longu hevur eina paralella skipan liggjandi, sum tað hevur annars ljóðað. Hann vísir eisini aftur, at Elektron hevur bundið seg til PBS fyri eina ávísa peningaupphædd.

# Gjaldskipan aftur í Løgtingið

**Vinnur eitt uppskot frá Sambandsflokkinum frama í løgtinginum, kann Gjaldskipanin hjá Elektron og peningastovnunum halda fram**

GJALDSKIPAN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Løgtingið fær nú aftur høvi at viðgera lógina um persónsupplýsingar, sum hevur ført til, at Gjaldskipanin hjá Elektron og peningastovnunum helst er steðgað. Sambandsflokkurin hevur lagt uppskotið fyri tingið í eini roynd at forpurra ætlanina hjá Høgna Hoydal, landsstýrismanni, at steðga Gjaldskipanini. Gjaldskipanin avgreiðir sjálvvirkandi flytingar fyri fólk. Tað verður gjørt við einari føroyskari útgávu av Betaling-Service hjá PBS í Danmark. Skipanin hevur við sær, at upplýsingar fara til Danmarkar at venda, og tað helt Høgni Hoydal vera í andsøgn við lógina um persónsupplýsingar, sum hevur til endamáls at verja trygd hins einstaka.

Ivi hevur alla tíðina verið um, hvat viljin hjá løgtinginum í roynd og veru var. Høgni Hoydal hevur alla tíðina víst til, at Løgtingið álegði honum at bera so í bandi, at edv-skráir við persónsupplýsingum skulu liggja í Føroyum. Onnur siga, at Høgni Hoydal hevur mistulkað ætlanina hjá løgtinginum.

Hendan iva roynir Sambandsflokkurin nú at fáa ein enda á, og kemur uppskotið ígjøgnum, sleppur Gjaldskipanin helst aftur at virka frítt. Uppskotið tekur rættin hjá landsstýrismanninum at orða reglur um flutning av persónsupplýsingum til útlond, herundir at steðga ella avmarka útflutning. Tað var annars júst hetta, sum Rættarnevndin á sinni álegði landsstýrismanninum.

Í øðrum lagi útgreinar Sambandsflokkurin grein 16, ið umrøður útflutning av upplýsingum. Sagt verður, at persónsupplýsingar bert kunnu flytast til útlond, sum kunnu tryggja eina fullgóða viðgerð av upplýsingunum. Metast skal um viðgerðina sum heild, dentur skal leggjast á endamálið við viðgerðini, slagið av upplýsingum, viðgerðartíðina, galdandi rættarreglur, siðvenjur og trygd.

Sostatt tekur Sambandsflokkurin tráðin hjá Dátueftirlitinum upp, sum sigur, at talan ikki er um viðkvæmar upplýsingar, sum fara til Danmarkar við Gjaldskipanini, og tí snýr málið seg heldur um vinnuforðing enn trygd hins einstaka.

Tað kann væntast, at uppskotið hevur ein møguleika fyri at vera samtykt, tí millum annað hava fleiri umboð fyri Fólkaflokkin sagt seg ivast. Løgtingið hevur áður havt møguleika at viðgera málið, men tað datt burtur, tí Rættarnevndin súltaði málið. Kortini skar Høgni Hoydal ígjøgnum.

Spurningurin er, um tað kann fatast sum eitt misálit á Høgna Hoydal, um málið verður samtykt. Sjálvur sigur hann við Sosialin, at hann einki hevði ímóti, at Løgtingið tekur málið upp.

– Tað stendur Løgtinginum frítt at taka málið uppaftur, og tí havi eg ikki tikið valdið frá Løgtinginum í hesum málinum. Tað er mín ábyrgd at syrgja fyri, at rættarstøðan samsvarar við lógina, og tí kundi eg ikki bara bíða í ævir eftir Løgtinginum, sigur Høgni Hoydal.

# Børn sleppa undan sjónvarpsgjaldi

**Eitt húski skal lýsast neyvari, og SvF sleppur ikki at krevja hyggjaragjald fyri heimabúgvandi børn yvir 18 ár. Tað er úrslitið av rumblinum, sum hevur tikið seg upp um innkrevjingarátakið hjá Sjónvarpi Føroya**

HYGGJARAGJALD
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tað hevur skapt øsing millum fólk og rumbul millum politikarar, at Sjónvarp Føroya roynir at krevja inn sjónvarpsgjald frá børnum yvir 18 ár, sum búgva heima. Tað tykist vera í andsøgn við lógina, sum sigur, at bert eitt sjónvarpsgjald kann krevjast frá hvørjum húski.

Nú er landsstýriskvinnan við mentamálum, Annita á Fríðriksmørk, farin inn í málið, og úrslitið er, at SvF ikki sleppur at krevja hyggjaragjald frá børnum yvir 18 ár næsta ár.

Landsstýriskvinnan tók beinanvegin, eftir hon varð gjørd varug við málið, stig til fund við leiðsluna í SvF. Niðurstøðan var, at lýsingin av hugtakinum húski var ikki nóg neyv í kunngerðini, og tí hevur Annita á Fríðriksmørk tikið avgerð um, at hon skal gerast av nýggjum, so hon verður greiðari. Broytingin fær gildi frá nýggjárinum, og tá skal so eingin ivi vera um, hvør hoyrir til eitt húski.

Í gjár greiddi Sosialurin frá einum dømi, har eitt húski kundi koma at gjalda trý sjónvarpsgjald, um SvF fekk sín vilja. Eitt fyri hjúnini, eitt fyri 18 ára gamla sonin, sum hevði sjónvarp á kamarinum, og eitt fyri 85 ára gomlu ommuna, sum eisini hevði sjónvarp hjá sær.

Sum skilst kemur tann støðan ikki fyri, tá nýggja kunngerðin er lýst.